Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Hagtøl um heimloysi

Spurningar:

1. Verður tað arbeitt við at fáa hagtøl fyri heimloysi í Føroyum?
2. Um ja, nær verða hesi væntandi klár?
3. Um ja, hvør er definitiónin upp á heimloysi í hesum arbeiðinum?
4. Er nakað arbeiði í gongd, ið skal tryggja heimleysum í Føroyum nøktandi umstøður og hjálp?

Viðmerkingar:
Undirritaða hevur fleiri ferðir áður lyft spurningum um heimloysi í Føroyum. Hóast samgongan ikki hevur ætlanir um at áseta, hvør myndugleiki hevur ábyrgd av heimleysum, so hevur landsstýrismaðurin sagt, at hon vil arbeiða við at fáa hagtøl um heimloysi í Føroyum. Hesin fyrispurningurin verður settur, fyri at fáa greiði á um hetta arbeiðið er farið í gongd, og hvussu tað líður við hesum.

Á Løgtingi, 8. desember 2021

Hervør Pálsdóttir